Starvslýsing

Heimatænastan

## Avloysari fyri sjúkrarøktarfrøðing Heimatænastan Eysturoy

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi til tíðarskeiðið 01.09.2008 til 31.08.2009.

Arbeiðstíðin er 30tímar pr. viku í skiftandi vaktum, tó mest dagvaktum. Arbeiðið umfatar sjúkrarøkt og vegleiðing til borgarar, sum búgva heima ella á eldrasambýli. Arbeiðsøkið er øki 3, sum umfatar allar kommunur í Eysturoynni uttan Eiðis- og Sunda kommunu.

**Førleiki:**
- Prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan áhuga fyri primera økinum
- Fleksibilitetur
- Góð samstarvs- og samskiftisevni

**Vit bjóða:**
- Eitt avbjóðandi, fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar,
- Toymisarbeiði, har dentur verður lagdur á at veita góða tænastu til borgaran eins og gott og mennandi arbeiðsumhvørvi
- Innleiðslu
- Tænastubil

**Setanartreytir:**
Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til økisskrivstovuna á tlf. nr 449249.

**Umsókn:**
Send eina umsókn við prógvi v. meira.til:
Heimatænastan Eysturoy
Økisskrivstovan, Heilsumiðstøðin
Postboks 47
FO 610 Saltangará

**Umsóknarfreist: 25.07.2008**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 360000, Faks 360001, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

# Vitjið Vágar í vikuskiftinum

# Stubbin hevur framsýning av húsvognum og bátum á Flúgvarabedingini

# Stubbin Tlf 471800



## Leys størv

### Varaleiðari og pedagogar til dagstovnin í Løkjatúni á Argjum

Tórshavnar kommuna søkir vegna dagstovnin í Løkjatúni á Argjum eftir varaleiðara at arbeiða 35 tímar um vikuna og pedagogi til barnagarðin at arbeiða 30–35 tímar um vikuna at byrja 1. august 2008 ella eftir avtalu. Søkt verður eisini eftir pedagogi til frítíðarskúlan at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 15. august 2008 ella eftir avtalu.

Setanarviðurskifti
Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknir
Umsóknir við viðmælum og upplýsingum um royndir og útbúgving skulu vera Dagstovninum í Løkjatúni, Løkjatún 5, 160 Argir, í hendi innan fríggjadagin 25. juli 2008.

Meira at vita
Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Gudruna Winthereig Rasmussen, stovnsleiðara, tlf. 302390/219019.

SENDISTOVAN

Tórshavnar kommuna

## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

